# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur  tann 31. august 2023, kl. 17.00

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 199**
Uppskot til viðmæli um grindaformann
J.nr.: 22042-1-2020

Joen Hendrik Isaksen hevur boðað frá, at hann ynskir at funnin verður ein annar grindaformaður í Vestmanna.

Á bygdaráðsfundi tann 29. juni 2023 samtykti Kvívíkar býgdarráð viðmæli av grindaformonnum fyri hvalvágna í Leynum at senda sýslumanninum. 4 grindaformenn vóru settir á listan, har Jóni Durhuus úr Vestmanna var tann eini.

Kvívíkar bygdaráð viðmælir Vestmanna bygdarráð at seta Brandur Isaksen úr Kvívík á viðmæli, sum ein av grindaformonnunum fyri hvalvágna í Vestmanna

**Viðv. 199**
Tilmæli frá Kvívíkar býgdaráðið varð einmælt samtykt.

Bjørg á Rógvi, borgarstjóri fór av fundinum vegna ógegni, og luttók tí ikki í viðgerðini av máli 200.

**Mál 200**
Umsókn frá Leivur á Rógvi um sundurbýti av matr. nr. 106a
J.nr.: 104002-3-2023

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 22. august umsókn frá Leivur á Rógvi um sundurbýti av matr.nr. 106a. Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 200**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

Bjørg á Rógvi, borgarstjóri komin aftur á fund.

**Mál 201**
Áseting av brúgvagjøldum
J.nr.: 801002-1-2023

Havnanevndin viðgjørdi á fundi 22. august 2023 áseting av brúgvagjøldum fyri fiskiskip, sum eru løgd og tikin úr drift.

Tosað hevur verið um, at brúgvagjaldið ikki bert skal verða galdandi fyri fiskiskip, men fyri skip yvirhøvur, sum eru løgd og tikin úr drift.

Nevndin mælir til at broyta *fiskiskip* í bygdarráðssamtyktini til at vera *skip og bátar*, sum eru løgd/lagdir og tikin/tiknir úr drift.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. august 2023 tilmæli frá Havnanevndini. Nevndin samtykti einmælt at viðmæla tilmæli frá Havnanevndini, sum omanfyri lýst.

**Viðv. 201**
Tilmæli frá Havnanevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál 202**
Áseting av prísi fyri el, sum Vestmanna Havn selur til skip og bátar.
J.nr.: 1301002-2-2023

Havnanevndin viðgjørdi á fundi 22. august 2023 áseting av prísi fyri el, sum Vestmanna Havn selur til skip og bátar.

Nevndin mælur til at seta prísin til 2 kr. fyri kilowatttíman.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. august 2023 tilmæli frá Havnanevndini. Nevndin samtykti einmælt at viðmæla tilmæli frá Havnanevndini, sum omanfyri lýst.

**Viðv. 202**
Tilmæli frá Havnanevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál 203**
Eykajáttan til grind - 1. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2022

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. august 2023 mál um eykajáttan til grind

Játtanin til grind er á kr. 19.000.

Grindin í Vestmanna tann 14. juni 2023 hevur kostað kr. 114.000 higartil.
Tørvur er á kr. 95.000.

Fíggjarnevndin mælir til eina eykajáttan á kr. 100.000, sum verður fíggjað av "Hegn og Bøgarðar".

**Viðv. 203**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 204**
Umraðfesting av játtan til Talgildu Føroyar - 1. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2022

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. august 2023 mál um umraðfesting av játtan til Talgildu Føroyar

Fíggjarnevndin mælir til at flyta kr. 384.000
av 147400 - 01-1114350-10 "EDV hald / Internet hald"
til dimentión 731000 - 07-3751350-30 "Flyting til landið"

**Viðv. 204**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 205**
Val av dómsnevnd fyri ársins herðaklapp
J.nr.: 6002-1-2014

Sambært skipan og reglugerð skal bygdarráðið velja eina dómsnevnd at viðgerða innkomnu uppskotini.

3. Dómsnevnd
   a. Ein dómsnevnd við trimum bygdarráðslimum viðger innkomnu uppskotini, og ger av, hvør ið fær heiðurin sum Ársins herðaklapp. Dómsnevndin situr alt valskeiðið.

**Viðv. 205**
Í dómsnevndina vóru vald: Sára Jógvansdóttir, Eyðun Hansen og Ingi Olsen

Bókin lisin. Fundur lokin kl. 18:20

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Bjørg á Rógvi | Sára Jógvansdóttir | Eyðun Hansen |
| Laila Haldansen | Anja Haldansen | Ingi Olsen |